# Løgmaður tók røttu avgerðina

**Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, fegnast um, at løgmaður endiliga er komin til eina niðurstøðu í málinum um setanina av landsantikvari. Hann heldur, at Anfinn Kallsberg tók røttu avgerðina, men tó heldur formaðurin, at løgmaður hevur víst ókonsekvens viðvíkjandi eftirliti av landsstýrismonnum**



*Formaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard, heldur, at løgmaður tók røttu avgerðina. Tó er hann ikki ósamdur við Høgna Hoydal í, at hetta málið sæð í ljósinum av øðrum málum ikki hevur verið viðgjørt eins*

FRÁKOYRING
*Ingrid Bjarnastein*

– Eg fegnist um, at tað endiliga hendi okkurt í hesum málinum, og at løgmaður endiliga fekk tikið seg saman til at gera nakað, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum.

Formaður Javnaðarfloksins heldur, at løgmaður tók røttu avgerðina.

– Nú setanarbræv og alt annað var avgreitt, hevði løgmaður ikki nógv annað í at velja. Hevði hann gjørt okkurt fyrr, so hevði hann kunnað givið eina átalu, men so var ikki.

Sjálvt um Jóannes Eidesgaard heldur, at løgmaður hevur tikið røttu avgerðina, so skilir hann væl Høgna Hoydal.

– At eg gevi løgmanni rætt vil ikki siga, at eg eri ósamdur við Høgna Hoydal. Løgmaður hevur í hesum málinum víst, at hann ikki er konsekventur viðvíkjandi eftirlitinum av sínum landsstýrismonnum. Vit minnast øll rumblið við Landsverksfrøðinginum, og tá lat hann málið bara vera mál.

– Nú hava vit sæð, at løgmaður er farin við klóm og nevi at verja ein landsstýrismann hjá sínum egna flokki. Men málið sæð fyri seg sjálvt, so hevur løgmaður tikið røttu avgerðina.

## Rumbul

Jóannes Eidesgaard sigur, at hann roknar við at samgongan hevur vant seg við, at ósemjur eru ein partur av gerandisdegnum.

– Nú er hetta málið ikki meira enn farið afturum, og so byrjar málið um hasi fiskiloyvini norðuri í Klaksvík. Samgongan fer frá einum rumbulsmálið til tað næsta, og hetta er vorðið til teirra hátt at stýra uppá.

Sum borgari og politikari, sum ikki hevur ávirkan á samgonguna, heldur Jóannes Eidesgaard, at henda gongdin kann koma at skaða samfelagið. Bæði einstaklingin, húskið og vinnurekandi.

– Ein stjórn eigur at borga fyri stabiliteti og arbeiðsgleði, har ein fegnast um at fáa nøkur úrslit. Á henda hátt, sum arbeitt verður nú, kemur ikki nógv av skafti.

– Eg haldi, at samgongan átti at stungið fingurin í jørðina og latið onnur sloppið framat. Stríð og ósemjur kunnu ikki vera gerandiskostur í eini stjórn, sigur formaðurin at enda.

Alfred Olsen:

# Fólkaræði er í vanda



**Næstformaðurin í Sambandsflokkinum heldur, at løgmaður hevur lagt lunnar undir eina nýggja leið í føroyskum politikki, sum um hon heldur fram, kann fara at skaða fólkaræði**

FRÁKOYRING
*Solby A. Eliasen*

– At løgmaður hevur gjørt av at koyra landsstýriskvinnuna í mentamálum frá, er ein poltitisk avgerð, og tað er nakað nýtt í føroyskum politikki, sigur Alfred Olsen, næstformaður í Sambandsflokkinum. Og hann heldur eisini, at samgongan átti at lagt frá sær undir tílíkum umstøðum, tí um tað fer at verða vanlig mannagongd framyvir, at landsstýrisfólk soleiðis missa høvdið, uttan at tað fær fylgjur, so er fólkaræði í stórum vanda. Hann vísir á, at tað hevur verið vanligt, at ein ella onnur kanning ella eitt brot á onkrar umsitingarligar reglur plaga at vera orsøk til, at eitt landsstýrisfólk verður koyrt frá.

– Í hesum førinum er talan um eina reina politiska avgerð, sigur Alfred Olsen.

Alfred Olsen heldur sum sagt, at samgongan átti at lagt frá sær, men hann ivast stórliga í, um tað veruliga fer at henda.

– Henda samgongan letur til at tola nógv av, má sigast, so eg loyvi mær at ivast í, um hon fer at skrædna, hóast tað rætta hevði verið, at hon legði frá sær, sigur hann.

Men um hon heldur fram, so er vandi fyri, at her bara verður kreppa oman yvir kreppu at klandrast um, meðan onnur týdningarmikil mál liggja á láni, sigur næstformaðurin í Sambandsflokkinum.

# Lærið at fanga kundan

**Benny Ejdesgaard, sum eigur og rekur fyritøkuna, Samskifti, fer um vikuskiftið at skipa fyri skeiði, sum gongur út uppá, at geva kunning um, hvussu handlarnir skulu pynta vindeyguni**

SKEIÐ
*Ingrid Bjarnastein*



*Benny Ejdesgaard fer um vikuskiftið at hava skeið á Venjingarskúlanum. Skeiðið gongur út uppá, at læra at pynta vindeygu*

Um vikuskiftið verður skeið hildið á Venjingarskúlanum.

– Skeiðið gongur í stuttum út uppá at geva kunning um, hvussu tú pyntar vindeygu í handlum bæði úti og inni, sigur Benny Ejdesgaard, sum skipar fyri skeiðnum.

Benny er útbúgvin innan hetta økið, og heldur hann, at um ein gongur ein túr runt í Havnini ella úti á bygd, so sær ein beinanvegin, hvør hevur gjørt nakað við at pynta vindeyguni og ikki. Skeiðið fer tí at viðgera tað visuella hjá handilsmonnunum.

– Vit fara at læra um ljós, uppseting og litir. Nógv eru líkaglað við vindeygunum, og síggja tey ikki sum ein part av handlinum. Tað er stórur tørvur á hesum í handilsverðini, heldur Benny.

Samskifti hevur annars havt fleiri onnur skeið í millum annað dekoratión.

# Dúgvan kemur mánadagin

**Dúgvan, sum leingi hevur verið úti úr sigling millum Leirvík og Klaksvík, kemur eftir ætlan aftur mánadagin**

SAMFERÐSLA
*Ingrid Bjarnastein*

*Dúgvan kemur mánadagin*



Strandfaraskipið Dúgvan kemur aftur í sigling mánadagin. Hetta er í øllum førum lagt út í kortið, sigur Magnus Magnussen, tekniskur leiðari á Strandferðsluni.

Dúgvan, sum hevur skift klassa, hevur verið leingi úr sigling um Leirvíksfjørð, og sigur tekniski leiðarin, at hetta kemst av, at nakrar ábøtur, sum klassin krevur skuldu gerast og tær hava tikið sína tíð.

Aksilin hevur verið úti og róðrið niðri, og ymiskt annað er nú fingið upp á pláss.

– Men ætlanin er so í øllum førum at fáa hana aftur at sigla mánadagin, segði Magnus Magnussen, beint sum hann var á veg av landinum fyrrapartin mikudagin.



# Toll- og Skatt ov seinir í svinginum

**Tey, sum hava goldið ov nógv í skatti, eiga møguleikan at boða Toll- og Skatt frá, hvar tey ynskja peningin fluttan. Fyri stóran part av landinum komu skattauppgerðirnar í ár so mikið seint, at peningurin longu var fluttur**

SKATTAUPPGERÐ
*Rúna Sivertsen*




*Brøvini við skattauppgerðunum frá Toll- og Skattstovuni komu fleiri so seint, at fólk ikki fingu møguleika at siga frá, hvar tey ynsktu peningin fluttan*
*Mynd Álvur Haraldsen*

Skattauppgerðirnar í ár vóru dagfestar 12. februar. Men fleiri skattaborgarar kring landið fingu ikki brøvini fyrrenn tann 26. og 27. Tá var ov seint at boða Toll- og Skattovuni frá, um peningurin skuldi á aðra konto enn ta frammanundan fráboðaðu.

Verður hugt at skattauppgerðunum seinastu árini, so er dagfestingin á leið tann sama, og tá eru brøvini komin í so mikið góðari tíð, at fólk høvdu møguleikan at broyta konto.

Sosialurin hevur fregnast hjá Toll- og Skatt, Elektron og hjá Postverkinum.

Á Elektron siga tey, at tey hava hildið seg til avtaluna við Toll- og Skatt. Postverk Føroya hevur ikki ligið á brøvunum, men borið tey út so skjótt, tey vóru posthúsunum í hendi.

Niðurstøðan má verða, at tað er Toll- og Skattstova Føroya, sum hevur ábyrgdina og ikki hevur tikið hædd fyri tíðini, tað tekur Elektron og Postverkinum at avgreiða eina so stóra nøgd av skjølum og brøvum.

Dorit Reinert, deildarleiðari á menningardeildini hjá Toll- og Skattstovu Føroya, sigur, at tá so nógv skjøl skulu avgreiðast er vandi fyri seinkingum til staðar. Tí skuldi útbetalingin kanska bíða einar tveir dagar, so fólk fingu møguleikan at siga frá, ynskja tey peningin á aðra konto.

14.720 skattaborgarar fingu tilsamans góðar 45 miljónir krónur aftur í skatti. 1795 máttu gjalda tilsamans 2,6 miljónir krónur. Restin, 16048 skattaborgarar, høvdu hvørki goldið ov lítið ella ov nógv í skatti í fjør.

# Barnasjónleikarastevna á triðja sinni

**17. mai skipar Megin-felag áhugaleikara Føroya fyri Barnasjónleikarastevnu í Havn**

BARNASJÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*



MáF skipar fyri Barnasjónleikarastevnu í Havn leygardagin 17. mai 2003. Freistin at tekna seg er longd til 17. mars 2003.

Hetta er 3. árið á rað, MáF hevur Barnasjónleikarastevnu í Havn, og hevur tiltakið hepnast so væl, at avgjørt er at gera stevnuna til fastan tátt í virksemi MáF's, soleiðis at hon verður annaðhvørt ár, t.v.s. í 2003, í 2005 o.s.fr.

Barnasjónleikarastevnan er ein sera spennandi uppliving hjá børnum. Tey fáa møguleika at royna seg á palli fyri øðrum børnum, og tey fáa eitt stórt upplivilsi og íblástur, tá tey síggja tað, sum onnur børn framføra.

Í ár er ætlanin at leika í Sjónleikarhúsinum, á Meiarínum og í Grasagarði, alt eftir hvussu stór luttøkan verður.

Í ár verður umframt føroysku børnini ein bólkur úr Hetlandi við.

Hugmyndin við Barnasjónleikarastevnuni er at eggja lærarum til at brúka sjónleik og drama í síni undirvísing, at arbeiða við eini søgu, søgn, ævintýri, kvæði, yrking, mytu ella onkrum heilt øðrum, og burtur úr tí gera ein lítlan leik, sum skal framførast á sjónleikarastevnuni.

Tað eru óendaligir møguleikar. Tað kann vera ein vanligur leikur við dialogi, tað kann vera sang-leikur, dansileikur ella mimuleikur. Tað ber eisini til at hava eitt frásøgufólk, meðan spælt verður. Leikurin kann gerast sum komedia ella tragedia. Til ber eisini at brúka eitt sindur av hvørjum.

- Aldursbólkurin er børn millum 9 og 14 ár.
- Leiklongdin millum 15 og 20 minuttir.
- Pallmyndin einføld, skjót at seta upp og taka niður aftur, t.d. eitt einkult bakteppi.
- Meira kann verða gjørt burturúr búnunum.

Tað ber til at fáa vegleiðing og hjálp frá MáF, bæði praktiska og leiklistarliga.

MáF vónar, at skúlarnir taka væl undir við Barnasjónleikarastevnuni.

# Øll vilja hava broyting, men eingin vil broyta seg

**TK Stovan skipar fyri kunningarfundi um broytingarfúsa leiðslu í dag**

KUNNINGARFUNDUR
*Tíðindaskriv frá TK Stovuni*

Allar broytingar byrja við, at einstaklingar og virkir eru til reiðar at fara ígjøgnum broytingina og tískil eisini eru til reiðar at bera seg øðrvísi at enn áður.

Skiftandi umstøður seta krøv til virkir og stovnar um alla tíðina at laga seg til broytingar. Tey seinnu árini hevur hugtakið broytingarfús leiðsla vunnið alsamt meiri frama. Broytingarfús leiðsla snýr seg í stuttum um, hvussu leiðslan tryggjar, at broytingar vera settar í verk og førdar út í lívið.

Nú er møguleiki at kunna seg um, hvat broytingarfús leiðsla er, tí TK Stovan skipar hósdagin 6. mars fyri Kunningarfundi um Broytingarfúsa Leiðslu. Evni sum verða tikin upp eru m.a.: hví tað er so torført at fremja broytingar, hvørjar orsøkir vanliga eru til mótstøðu ímóti broytingum og hvussu vit kunnu lofta og beina burtur mótstøðu ímóti broytingum. Eisini verður umrøtt, hvussu til ber at gera broytingarfúsa leiðslu ítøkiliga og skiljandi og hvørji ítøkilig amboð eru, ið kunnu nýtast í broytingartilgongdini.

Eggert Cederholm frá donsku ráðgevarafyritøkuni Implement (www.implement.dk), heldur fyrilestur um ”Broytingarfúsa leiðslu” og við at luttaka á fundinum kannst tú læra meira um, hvussu tú lættari kann fremja broytingar í verki.

Meira fæst at vita um kunningarfundin við at venda sær til TK Stovuna, sigur TK Stovan í tíðindaskrivi.